# Yvirdosis av Føroyum í DR2

**Leygardagin 3. mars kunnu danskir sjónvarpshyggjarar seta seg væl til rættis í sofuni, kasta beinini upp á borðið, og taka ímóti einari tríggjar tímar langari sending um Føroyar. Tá sendir DR2 nevniliga »Temalørdag« um lítlabeiggjan í ríkisfelagsskapinum. Lagt seningina til rættis hevur føroyingurin Herluf Sørensen.**

SJÓNVARPSSENDING
*Rúnar Reistrup*


*Herluf Sørensen hevur síðan 1997 arbeitt sum produsari hjá DR2. Farna hálva árið hevur hann arbeitt við at leggja eina tríggjar tíma langa sending um Føroyar til rættis.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Eg síggi tað ikki sum mína uppgávu at halda hondina yvir føroyingum, men eg trúgvi nú kortini, at sendingin fer at geva vanliga dananum eina meira fjølbroytta mynd av Føroyum enn hana, ið vanliga verður framborin í donsku fjølmiðlunum.

Hetta sigur føroyski produsarin á DR2, Herluf Sørensen, sum hetta farna hálva árið hevur lagt eina temasending um Føroyar og føroyingar til rættis fyri DR2.

Talan er um »Temalørdag«, ið er ein sonevndur sendiblokkur, har tríggir tímar verða settir av til at lýsa eitt evni ígjøgnum til dømis dokumentarfilmar, mentunarsendingar, samrøður og kjak. DR2 hevur »Temalørdag« á skránni hvønn leygardag, og leygardagin 3. mars er ætlanin at tríggjar tíma langi sendiblokkurin skal snúgva seg um Føroyar.

Herluf Sørensen hevur arbeitt um produsari á DR2 síðan 1997, har han serliga hevur fingist við sendingina »Viden om« og tíðindasendingina »Deadline«. Onkrar »Temalørdag« sendingar hevur hann eisini verið við til at gjørt.

## Skráin løgd

Skráin fyri teir tríggjar tímarnar um Føroyar, liggur longu nú klár.

Fyrst verður filmurin »Tre blink mod vest« hjá Ullu Boje Rasmussen sendur. Síðan kemur ein 50 minuttir lang dokumentarsending um Føroyar í dag, og um hvørjar møguleikar landið hevur at gerast sjálvbjargið.

Hareftir verður kjak í sjónvarpsstovuni, har millum onnur Anfinn Kallsberg, løgmaður, og møguliga Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri, fara at skifta orð.

»Temalørdag« um Føroyar rundar av við tveimum smærri sendingum úr Føroyum. Onnur fer at snúgva seg um Svínoy, har húsini tíðliga í summar vórðu knýtt saman við mest framkomna tráleysa internetsambandinum í landinum. Í hinari verður tosað við Páll Patursson, bónda í Kirkjubø, millum annað um Patursson ættina.

## Romantikkur og veruleiki

– Hugsanin handan skránna er, at fyrst vísa vit ta ókompliseraðu, romantisku myndina av Føroyum. Myndina, sum danir leingi hava havt í høvdinum, um nakrar hugnaligar føroyingar, sum, dansa føroyskan dans og hanga í línum og alt hatta har. So skifta vit yvir til nútíðina og taka fram, hvat føroyingar í veruleikanum takast við í løtuni og um arbeiðið, sum í løtuni fer fram til frama fyri at loysa frá Danmark, greiðir Herluf Sørensen frá.

Í hesari dokumentarsendingini verður millum annað hugt at fyrireikingunum til oljuvinnuna, og hvørja ávirkan tað fer at hava, um olja verður funnin.

– Vit reisa spurningin, um tað er vónirnar um oljuríkidømi, ið hava elvt til verandi loysingarhugin í Føroyum, og svara, at tað er tað ikki, tí tjóðkaparlyndið hevur allatíðina verið har, men at oljuvónirnar helst eru ein av orsøkunum til at bjartskygnið er so stórt júst í løtuni.

## Í gongd síðan summar

Herluf Sørensen byrjaði fyrireikandi arbeiðið til temasendingina í summar. Í november mánaði komu hann, Frank Esmann, ið er vertur á »Temalørdag« og ein fotografur so til Føroya at gera upptøkurnar.

Men sjálvt hugskotið aftan fyri sendingina er væl eldri enn so.

– Eg havi leingi arbeitt við einum hugskoti um at gera eina sending um, hvat tað er, sum bindur føroyingar, grønlendingar og danir saman. Um vit í eina løtu taka peningaliga spurningin burturúr, so er talan jú um trý ymsik fólkasløg og trý ymisk lond, so hví eru tey knýtt saman? spyr Herluf Sørensen, og hetta var eisini spurningurin í sendingini »Eitt ríki, tríggjar tjóðir«, sum hevur ligið á hugskotsborðinum hjá Herlufi í nógv ár.

Hetta hugskotið legði hann i fjør fram fyri DR2 sum eitt møguligt evni til »Temalørdag«, og soleiðis kom tað í lag, at Herluf skuldi leggja ein »Temalørdag« um Føroyar til rættis.

– Konseptið er nakað broytt eftir at hava verið ígjøgnum mylluna, og nú snýr tað seg so bara um sambandið millum Føroyar og Danmark. Men tað hevur ikki gjørt sendingina verri eftir mínari meting, sigur Herluf Sørensen.

## Ikki føroysk sending

Hóast temaleygardagurin um Føroyar soleiðis er lagdur til rættis av einum føroyingi, so leggur Herluf Sørensen áherðslu á, at sendingin er donsk.

– Hetta er ikki ein sending, sum skal tala eina føroyska søk. Men tað er eingin ivi um, at tá vit nú fáa tveir tímar at greiða frá um Føroyar, so hava vit møguleikan at geva eina meira fjølbroytta mynd av, hvat Føroyar og vanligi føroyingurin standa fyri, enn danir plaga at fáa frá fjølmiðlunum.

– Eg haldi at danir fáa eina nokkso einsporaða og ofta ikki serliga sakliga lýsing av Føroyum frá donsku fjølmiðlunum. So hóast hendan sendingin ikki er ætlað at halda hondina yvir føroyingum og bert at vísa fram hvussu góð vit eru her uppi, so kann hon kanska geva vanliga dananum eina penari mynd av føroyingum, enn hana hann hevur í høvdinum júst nú. Í hvussu er veit eg, at myndin hjá Frank Esmann (vertur í »Temalørdag«, blaðm.) er broyttist nógv, eftir at hann hevði arbeitt við sendingini, sigur Herluf Sørensen, sum í løtuni er í Føroyum og arbeiðir við einari aðrari verkætlan.

Enn er endalig avgerð ikki tikin um, nær »Temalørdag« um Føroyar verður sent, men allarhelst verður tað 3. mars.

»Temalørdag« er ein av teimum betri umtóktu sendingunum á DR2: Hyggjaraskarin plagar at liggja um 200.000 tá væl stendur til. Sendingin verður endursend í DR1, og tá plagar hyggjaratalið eisini at vera lutfalsliga høgt.



# 120 daga reglan hvørvur

**Løgtingið samtykti mikudagin eina áheitan á landsstýrið um at syrgja fyri, at starvmannalógin verður broytt, so120-daga reglan í samband við sjúku verður tikin av.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Magnus Dam*

Bjarni Djurholm fer helst í næstu tingsetu at leggja fram uppskot um at broyta starvsmannalógina, so 120-daga reglan í samband við sjúku verður tikin úr lógini.

Sum er kann ein arbeiðsgevari siga einum starvsfólki úr starvi, um starvsfólkið hevur verið sjúkrameldað í 120 dagar í einum 12 mánaða skeiði. Uppsagnartíðin er í tílíkum førum bert ein mánaður, meðan hon í vanligum uppsagnarmálum er tríggjar til fýra manaðir.

Javnaðarflokkurin vil hava hesa regluna strikaða í lógini, og hesum tók alt løgtingið undir við, tá ið málið kom til aðru viðgerð hósdagin. Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at meira verður gjørt við at fyribyrgja, at fólk, sum gerast sjúk, verða uppsøgd, og at tey, sum verða uppsøgd orsakað av sjúku, fáa longri uppsagnartíð.

## Endurskoða alla lógina

Vinnunevndin hjá løgtinginum viðgjørdi uppskotið hjá Javnaðarflokkinum, og tað var ein samd nevnd, sum heitti á løgtingið um at samtykkja uppskotið. Vinnunevndin sigur í sínum viðmerkingum, at verandi skipan kann hava sera óhepnar avleiðingar fyri einstøk starvsfólk, alt eftir hvussu hon verður umsitin. Hon heitir tí á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri at gera broytingar í lógini, so starvsfólk ikki verða uppsøgd við styttari freist.

Hinvegin kann tað hava við sær stórar trupulleikar fyri tey smáu arbeiðsplássini, um 120-daga reglan verður tikin av. Um heilt illa vil til, kann tað hava við sær, at smáar fyritøkur noyðast at gevast. Tí skal landsstýrið kanna, hvussu trupulleikin kann loysast á besta hátt.


*Savnsmynd*

Vinnunevndin heldur, at fleiri møguleikar eru fyri at betra um støðuna. Eitt nú kundi verið áhugavert at kanna møguleikarnar fyri eini sjúkutryggingarskipan, sum svarar til barsilstryggingarskipanina og arbeiðsloysistryggingina, heldur nevndin.

Í seinastu viðmerkingunum sigur vinnunevndin, at lógin um starvsmenn, sum er frá 1958, eigur at endurskoðast í síni heild.

Bjarni Djurholm segði í løgtinginum mikudagin, at uppskot um at broyta galdandi lóg ikki verður lagt fyri løgtingið í hesari tingsetuni, tí tíðarfreistin er ov stutt. Tískil kemur málið helst fyri løgtingið aftur aftaná ólavsøku.

VIÐMERKINGAR

## Framvegis neyðugt við passi í Bretlandi

Kanska hava hesar viðmerkingar áhugað tá tit bera tíðindi úr ES.

Miðlarnir í Føroyum hava hesa seinastu tíðina viðgjørt evni viðvíkjandi ES og innflytan av livandi djórum og nú eisini um Schengen samarbeiðið.

Tað verður sagt at ein kann reisa uttan pass í øllum Schengen londunum t.e.

ES londini pluss nøkur onnur lond. Hetta er ikki heilt rætt. Bretland (t.e. England, Skotland og Wales) eru ikki partar av Schengen samarbeiðinum. Ein skal sostatt enn nýta pass fyri at koma til og frá Schengen londunum til Bretland. Ein grund til at Bretland ikki er við í Schengen samstarvinum, er tað tætta sambandið við Bretland hevur við Commonwealth londini. Fólk úr Commonwealth hava fyrimunir við at koma til Bretland, og tað vildið skapt tvørleikar um tey síðani kundu ferðast frítt í hinum ES londunum.

Tað verður eisini sagt í Føroyaum at djór kunna flytast frít ímillum londini í ES. Hetta er heldur ikki heilt rætt. Bretland er eitt oyggjaland, ið enn roynir at hava strangt eftirlit við



hvørji livandi djór kunnu flytast inn í landið. Eftir nógv stríð, so er tað nú gjørligt at flyta t.d. hundar og kettir úr “the continent” (t.e. tað evropeiska fastlandið) um tey hava eitt sokallað “Heilsu-pass” t.v.s. at tey kunna prógva at tey eru vaksineraði ímóti ymsum sjúkum so sum Rabies. Eitt tekin skal eisini leggjast undir húðina á hesum húsdjórunum. Tað verður sagt at bert heilt fá nýta hendan møguleikan helst tí at hesin framferðarháttur er raættiliga tvørligur.

Nú búgva tað bert eini 60 milliónir fólk í Bretlandið, so tað er lætt at gloyma at Bretland hevur serstøðu á onkrum økjum.

Tað er eisini vert at leggja til merkis at eitt nú t.d. Norðmenn (og -kvinnur) kunna rættiliga lætt fáa arbeiðsloyvi í Bretlandi um tey eru lesandi. Hetta er tí Norra er limur í EØS. Ung føroysk lesandi hava ikki somu møguleikar.

Vinarlig heilsan

**Helgi Joensen**
29 Brackley
Queens Road
WEYBRIDGE
Surrey KT13 0BL
UK
Tel. +44 (0) 1932 82 90 27
Fax +44 (0) 870 121 39 26
e-mail:
Helgi.Joensen@Lineone.net

